Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting: 21.10.2025
Mál nr.: 24/11656
Málsviðgjørt: HP, JAK

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
Løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.	**1.** Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis: “**Løgtingslóg um dagpening vegna sjúku o.a.**”
	2. Sum stytt heiti á løgtingslógini verður sett: “**(Sjúkradagpeningalógin)**”
§ 9. ... *Stk. 2. ...* *Stk. 3.* Av dagpeningaveitingini verður eisini veitt frítíðarløn, sum fer í grunn.	**3.** Í § 9, stk. 3 verður “fer í grunn” broytt til: “fer á frítíðarlønarkontu”.

	“**Kapittul 6 a** **Afturrindan til privatar arbeiðsgevarar** **§ 13 a.** Privatur arbeiðsgevari, ið seinast álíknaða inntøkuár hevur útgoldið í mesta lagi 4 mió. kr. í lønum, kann søkja um at fáa endurgoldnar lønarútreiðslur til ein starvsmann sambært løgtingslóg um starvsmenn, ið hevur verið óarbeiðsførur vegna sjúku longur enn 4 vikur. *Stk. 2.* Endurgjaldið verður gjørt upp eftir reglunum í kapittul 4 í løgtingslógini og verður bara veitt fyri tíðarskeiðið, sum fer út um 4 vikur. **§ 13 b.** Markið fyri útgoldnar lønir í § 13 a, 1. pkt. verður javnað tann 1. januar á hvørjum ári við lutfalsligu lønarhækkingini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag árið frammanundan.”